Dan Petersen, løgtingsmaður:

-Spýtið í lógvarnar

-Latið ikki máttloysið sigra. Latið okkum fyrst fáa saneringina frá hondini. Síðani er framtíð í foredling av fiski, framtíð í frysta fiskinum, framtíð í djúpvatnsfiskiskapi. Framtíð í samstarvi við russar. Framtíð í alivinnuni og loksins framtíð í alivinnuni. Tað er tí mín sannføring, at eftir hetta fáa vit eitt betri samfelag, við fleiri hondum í útflutningsvinnuni enn nakrantíð. Vit skulu bróta upp um armar, spýta í lógvarnar og taka fatt segði Dan Petersen, løgtingsmaður javnaðarfloksins í Eysturoynni, undir umrøðuni av fíggjarlógaruppskotinum og løgmansrøðuni.



Vit eiga at skapa møguleikar fyri at fáa føroyingum arbeiði í útlendsku oljuvinnuni heldur Dan Petersen tingmaður

Hóast ungur í takinum, so sat eg í tinginum allan seinasta vetur og var eisini limur í fíggjarnevndini. Tað, sum undraði meg í hesum arbeiði, var, hvussu lítla ávirkan tingmenn og eisini fíggjarnevndarlimir høvdu á fíggjarlógina. Tað var mestsum ógjørligt at broyta tøl, sum landsstýrið hevði sett á uppskotið. Serliga minnist eg ta famøsu lívfiskastøðina í Skopun, sum fyrrv. landsstýrismaður, John Petersen, umsat, og sum hann nú byggir, og hitt var undirsjóvartunnilin um Vestmannasund, sum S. Á. Ellefsen umsat. Tann seinni parturin var seinni tikin av, tað gjørdu danir við kravinum um ta realistisku fíggjarlógina. Vit hava eisini dømi um, at landsstýrið setur se yvir løgtingið, t.d. tá ið fyrrverandi landsstýrismaðurin, sami S.A. Ellefsen, legði Dúgvuna beint móti eini løgtingssamtykt.

Seinasta ár var fólkaskúlin skorin inn at beini, og játtanin er tann sama komandi ár. Hetta hevði verið at hvað við, um aðrir skúlar fingu somu viðferð. Men so er ikki. Vaksnamannaskúlarnir hava flestir fingið nógv størri játtanir. Teknisku skúlarnir, handilsskúlarnir og læraraskúlin hava fingið rúmari ræsur. Hví skulu vit útbúgva lærarar til arbeiðsloysi? Hetta er so ein nýggjur politikkur, enn tann ið Thomas Arabo stóð fyri, tá ið hann umsat skúlamiál. Sambært løgmansrøðuni, so er Fróðskaparsetrið skert. Hetta samsvarar ikki við fíggjarlógina, tí har er játtanin tann sama sum seinasta ár, nevniliga 10.618.000 kr. Teir hava eisini víðkað sítt virksemi við nýggjum lærugreinum og hava annars ætlanir um enn størri virksemi, sum tó er útsett. Í hesum ringu tíðum, tá ið 100 tals barnafamiljur noyðast av landinum, megu vit prioritera. Skulu vit prioritera arbeiðandi barnafamiljur, ella skulu vit prioritera kvart- og hálvakademikarar, sum verða klaktir á fróðskaparsetrinum? Vit megu sleppa okkum av við hesar stórmannalótirnar og sanna, at Føroyar ikki eru nakað storveldi. Luxemburg við 8-9 ferðir so stórum fólkatali hevur ikki ráð til universitet. Mentunarliga trýstið man vera munandi størri á tað landið, enn okkara. Vit hava ikki ráð til slíkt, sum tíðirnar eru. Annars er tað beinleiðis positivt, at ung, men vakin fólk, fara út í heim at siggja seg um og læra

Skúlabókagrunnurin hevur verið nevndur. Í fylgiskjølunum sæst, at teir hava fingið eina stóra eykajáttan. Eg haldi at landsstýrið eigur at hyggja eftir, hvussu hesir pengar verða brúktir. T.d. góvu teir eitt leksikon út. At almenningurin fíggjar slíkt luxusprojekt, er at geva børnum steinar fyri breyð, hava vit tær ringu tíðirnar í huga. Eg mæli til, at játtanin til grunnin verður skerd við tí, ið hetta leksikon kostar. Annars hugsi eg at privat forløg kundu gjørt arbeiði bíligari, tí skúlabøkur koma út í stórum uppløgum.

Politiska upplýsingin er kelda til øsing. Í okkara flokki er tað soleiðis, at flokksstjórnin umsitur okkara part av hesum peningi. Sum næstformaður í javnaðarflokkinum kann eg boða frá, at tað er ikki leiðslan í javnaðarfl., sum hevur ynskt hesa hækking.

Dan Petersen, tingmaður -Spýtið í lógvarnar og latið okkum taka fatt

Seinasta ár var játtanin til praktiskar fiskiroyndir ikki brúkt, og ein partur var brúktur til foredling av fiskavørum uppi á landi. Hetta saman við, at ein leiðandi fiskifrøðingur segði í útvarpinum á nýggjárinum, at hann helt ikki, at fiskiskapur á djúpum vatni hevði nakran skund, gav ta fatan, at viljin til hesar lívsneyðugu royndir ikki var til staðar. Tað er tí við gleði, at eg síggi, at henda játtan er munandi hækkað. Hetta er investering í framtíðina.

Í sambandi við landsverkfrøðingin er tað at fegnast um, at vegurin Millum Fjarða í Eysturoynni í løtuni verður breiðkaður. Hetta hevur verið ein fløskuhálsur og ein deyðsfella. Men tey, ið koyra framvið, undrast tó yvir at vegurin samstundis verður hækkaður eina manshædd. Vit ynsktu okkum ein breiðari veg, og ikki ein hægri veg. Teir pengar, sum hetta tilfar kostar, kundu verið nýttir til at breiðka vegin uttan fyri Skálabotn, har jú deyðsvanlukka er hend orsakað av smølum vegi.

Meðan eg eri við landsverkfrøðingin, fari eg at gera vart við, at tá í IRF-vegurin oman fyri Saltnes var gjørdur, skyldaði landskassin Nes kommunu 1,7 mill. kr. Seinni er semja gjørd millum landsverkfr. og Nes kommunu at gjaldast skulu 1,5 mill. kr. yvir 3 ár við 500.000 kr. um árið. Eg fari at spyrja landsstýrismannin í kommunumálum ella fíggjarmálum um hesar 500.000 kr. eru markaðar til Nes kommunu. Tofta bygd hevur eitt tað størsta arbeiðsloysið í landinum og hevur akuttan tørv á hesum pengum.

Størstu vandamál í samfelagnum er arbeiðsloysið. Landsstýrið má gera alt, ið gerast kann, at basa hesum. T.d. eiga møguleikar fyri handverkarar at fáa arbeiði á útlendskum boripallum at skapast. Og eru ikki møguleikar hjá sjófólki okkara á teimum skipum í arbeiða í oljuvinnuni? Kann hetta eydnast, so hava vit ein stab av fólki við útbúgving, tann dag vit sjálvir fara í gongd við hesa vinnu.

Eg havi varhugan av, at nógv verður ferðast uttanlands. Landsstýrið eigur at hava eitt vakið eyga við ferðakontu hjá almennu stovnunum. Og somuleiðis við skeiðvirksemi.

Andstøðan fýlist á, at ongar loysnir eru at hóma. Jú, vit hava loysnir, og vit hava framtíðarætlanir. Fyrst skal saneringin fáast frá hondini. Síðan er framtíð í foredling av fiski, framtíð í frysta fiskinum, framtíð í djúpvatnsfiskiskapi. Framtíð í samstarvi við russar. Framtíð í alivinnuni og loksins framtíð í oljuvinnuni.

Latið ikki máttloysi sigra. Tað er mín sannføring, at eftir hetta fáa vit eitt betri samfelag, við fleiri hondum enn nakrantíð í útflutningsvinnuni. Vit skulu bróta upp um armar, spýta í lógvarnar og taka fatt.

Bygdarhúsið í Hósvík

Bygdarhúsið í Hósvík verður leigað til ymisk endamál, s.s. bingo, brúdleyp, veitslur, fundarvirksemi o.m.a. Borðreiðast kann fyri uml. 300 fólkum. Fáið nærri at vita við at ringja

tlf. 22368